# Fiskimálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 12. juli 2016
Mál nr.: 16/00439-1
Málsviðgjørt: AK-MM/KM

**Løgtingsmál nr. xx/2016: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap**

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap

(Fiskidagar 2016/2017)

### § 1

Í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 106 frá 5. august 2015, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 27 verður orðað soleiðis:
“**§ 27.** Fiskidagar verða ásettir á landleiðunum frá 1. september 2016 til 31. august 2017 fyri fiskifør undir føroyskum flaggi.”

**2.** § 29, stk. 1 verður orðað soleiðis:
“Innan fyri hvønn av høvuðsbólkunum av fiskiførum í § 28, sum vóru í veiðiflotanum 1. januar 1995, verður fiskidagaskipan ásett fyri hesar undirbólkar við hesum fiskidagatali, sbr. tó stk. 3, sum verður býtt millum fiskiførini, tó so, at hædd verður tikin fyri møguligari umseting av fiskidøgum frá einum fiskifari til eitt annað í sama undirbólki, bólkur 5 tó undantikin, og endaligum avhendingum av fiskidøgum millum undirbólkarnar 4 A og 4 B í tíðarskeiðinum frá 1. september 2015 til 31. august 2016:
(...)

**3.** Í § 29 verða sum stk. 11-14 sett:
“*Stk. 11.* Umframt fiskidagar sambært stk. 1 verða ásettir fiskidagar fyri tíðarskeiðið frá 1. september 2016 til 31. august 2017 soleiðis:
1) Bólkur 3:
Línuskip yvir 110 tons: (...) fiskidagar.
2) Bólkur 4 A:
Útróðrarbátar millum 15 - 40 tons: (...) fiskidagar.
3) Bólkur 4 B:
Útróðrarbátar størri enn 40 tons á línuveiðu: (...) fiskidagar.
4) Bólkur 4 T:
Útróðrarbátar størri enn 40 tons á trolveiðu: (...) fiskidagar.
5) Bólkur 5:
Útróðrarbátar undir 15 tons á húkaveiðu: (...) fiskidagar.

*Stk. 12.* Fiskiførini í hvørjum undirbólki sær kunnu eftir 1. desember 2016 brúka av fiskidøgunum sambært stk. 11, tá fiskidagarnir, ið eru tillutaðir fiskifarinum við støði í ásettum fiskidøgum sambært stk. 1, eru brúktir.
*Stk. 13.* Fiskidagar, ið verða avhendaðir sambært § 14, stk. 1 ella stk. 2, 1. september 2016 ella seinni, verða sambært stk. 12 í hesi grein ikki roknaðir sum brúktir fiskidagar.
*Stk. 14.* Hvørt fiskifar kann í mesta lagi brúka lutfalsligan part av ásetta fiskidagatalinum fyri bólkin, sum ásett sambært stk. 11. Lutfalsligi parturin fyri fiskifarið verður roknaður sum tal av brúktum fiskidøgum hjá fiskifarinum fiskiárið 2015/2016, íroknað brúktir fiskidagar avhendaðir frá øðrum sambært § 14, stk. 1, býttir við talinum av brúktum fiskidøgum tilsamans í undirbólkinum, sambært § 29, stk. 1, fiskiárið 2015/2016."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið
Hetta lógaruppskotið snýr seg um at áseta fiskidagar fyri fiskiárið 2016/2017.
Umframt at áseta fiskidagar í § 29, stk. 1, verður skotið upp at áseta fiskidagar fyri hvønn av høvuðsbólkunum, sum fiskiførini í bólkinum undir einum kunnu nýta burturav, tá teirra egnu fiskidagar eru brúktir.
Grundað á, at hetta víkir frá siðbundnu ásetingini av fiskidøgum, verður hesin parturin av uppskotinum latin Fiskivinnuráðnum til hoyringar.

### 1.2. Galdandi lóggáva
Løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap ásetir, at Løgtingið í seinasta lagi 18. august skal hava samtykt fiskidagar fyri komandi fiskiárið, sum byrjar 1. september og heldur á til 31. august árið eftir. Henda skipan hevur verið galdandi í 20 ár. Sum heild hevur verið breið politisk semja um hesa skipan, tó at ósemja kann vera um ítøkiligu ásetingina av fiskidøgunum.

Á hesum sinni er í uppskoti at gera eitt ískoyti til verandi skipan, har fiskidagar eisini verða ásettir undir serligum treytum at kunna verða nýttir av fiskiførunum í ávísum undirbólkum.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum
Sambært løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap skal Løgtingið fyri hvørt fiskiár áseta fiskidagatalið fyri botnfiskaveiði á føroyska landgrunninum. Tað áliggur landsstýrismanninum í fiskivinnumálum at leggja uppskot fyri Løgtingið, so tingið hevur samtykt fiskidagarnar í seinasta lagi 18. august.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Landsstýrismaðurin hevur fingið tilmæli frá Havstovuni og frá Fiskidaganevndini, sum sambært lógini um vinnuligan fiskiskap skulu ráðgeva landsstýrismanninum um fiskidagar, og hvussu fiskiskapurin skal skipast komandi fiskiárið. Fiskidaganevndin mælir til, at fiskidagatalið verður óbroytt komandi ár, meðan Havstovan mælir til niðurskurð í

fiskidagatalinum hjá flestu bólkum í skipanini, men óbroyttar fiskidagar fyri ein einstakan bólk.
Umframt tilmæli um áseting av fiskidøgum hava bæði Havstovan og Fiskidaganevndin tilmæli um onnur viðurskifti fiskiskapinum eftir botnfiski undir Føroyum viðvíkjandi – eitt nú um fiskileiðir.

Sambært hagtølum um tillutaðar og brúktar fiskidagar er tað ymiskt, hvussu skipabólkarnir, og innan fyri teir tey einstøku fiskiførini, hava brúkt av sínum tillutaðu fiskidøgum. Ein lækking av fiskidagatalinum kann tí hava ymiskar avleiðingar fyri tey einstøku fiskiførini í sama bólki.

Skotið verður upp, at umframt fiskidagarnar, ið verða ásettir í § 29, stk. 1, verða fiskidagar ásettir fyri allar skipabólkarnar uttan bólk 2, sum fiskiførini í hvørjum bólki sær kunnu brúka lutfalsliga av, alt eftir hvussu stóran part av brúktu døgunum í bólkinum hvørt fiskifarið hevur brúkt fiskiárið 2015/2016.

Jú fleiri fiskidagar, ið eitt fiskifar hevur brúkt fiskiárið 2015/2016, jú fleiri fiskidagar kann tað sostatt brúka umframt sínar fiskidagar, sum fiskifarið fær tillutað við støði í fiskidagatalinum, ið er ásett í § 29, stk. 1.

Endalig avgerð er enn ikki tikin um, hvørji fiskidagatøl verða skotin upp fyri Løgtinginum at áseta fyri fiskiárið 2016/2017. Tí er heldur ikki tikin endalig avgerð um, hvussu nógvir hesir dagar undir einum skulu vera, men hugsanin er, at teir verða ásettir sum í mesta lagi 20-25% av fiskidøgunum, ið verða ásettir sambært § 29, stk. 1.

Avhendaðir fiskidagar í fiskiárinum frá 1. september 2016 til 31. august 2017 vera í hesum sambandi ikki roknaðir sum brúktir fiskidagar.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Fiskivinnuráðnum og hjá Vørn.

...............

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri Vørn, tí ítøkiligar eftirlits- og umsitingaravgreiðslur hjá Vørn verða nakrar fleiri grundað á ásetingarnar í broytta lógarverkinum.

Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið fer í fyrsta umfari at elva til, at beinleiðis tøku fiskidagarnir hjá hvørjum fiskifari sær í bólkunum 3 og 4, og felagsdagarnir hjá bólki 5, verða færri. Tí hevur uppskotið við sær

fíggjarligar avleiðingar fyri fiskiflotan. Men fíggjarligu avleiðingarnar vera tó avmarkaðar, tí møguligt verður, undir ávísum treytum, at gera nýtslu av fiskidøgum, sum verða ásettir umframt dagarnar í § 29, stk. 1.

Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ikki við sær umhvørvisligar avleiðingar.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum. Tó so, at avleiðingarnar av færri fiskidøgum kann síggjast meir aftur í økjum, har fiskiførini eru fleiri enn í øðrum økjum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

Uppskotið hevur ongar sosialar avleiðingar.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Lógaruppskotið er ikki tengt at millumtjóðasáttmálum, sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

Lógaruppskotið fær ikki fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar við atliti at millumtjóða samstarvi Føroya.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Mett verður ikki, at uppskotið er í ósamsvari við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, harundir Evropeiska mannarættindasáttmálan ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Marknaforðingar**
Uppskotið elvir ikki til marknaforðingar.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sosialar avleiðingar | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1, nr. 1**
Ásettir verða fiskidagar fyri fiskiárið 2016/2017.

**Til § 1, nr. 2**
Ásett verður fiskidagatal fyri hvønn skipabólk og undirbólk fyri fiskiárið 2016/2017.

**Til § 1, nr. 3**
Í stk. 11 verður fiskidagatal ásett fyri undirbólkar fyri fiskiárið 2016/2017, sum fiskiførini í bólkunum undir einum í hvørjum bólki sær við ávísum treytum kunnu brúka burturav eftir 1. desember 2016.

Fiskifar, sum hevur nýtt allar sínar egnu fiskidagar tillutaðir fiskifarinum við støði í § 29, stk. 1, kann innan fyri ásettu avmarkingina halda fram við fiskiskapinum. Brúktir fiskidagar verða avroknaðir fiskidøgunum ásettir sambært § 29, stk. 11.

Til tess at forða fyri møguligari misnýtslu verða fiskidagar, ið eru avhendaðir sambært § 14, stk. 1 ella stk. 2, 1. september 2016 ella seinni, ikki roknaðir sum brúktir fiskidagar, tá gjørt verður upp, um fiskidagar tillutaðir við støði í § 29, stk. 1 eru brúktir.

Møguleikin hjá tí einstaka fiskifarinum at brúka av fiskidøgunum ásettir sambært stk. 11 er beinleiðis tengdur at, hvussu stóran lutfalsligan part av brúktu fiskidøgunum fiskifarið hevði av samlaða brúkta fiskidagatalinum hjá undirbólkinum fiskiárið 2015/2016.

Í brúkta talið av fiskidøgum hjá fiskifarinum fiskiárið 2015/2016 verður eisini roknað brúkt fiskidagatal grundað á avhending frá øðrum, sambært § 14, stk. 1. Fiskidagar, avhendaðir millum høvuðsbólkar sambært § 14, stk. 2, telja ikki við sum brúktir fiskidagar hjá fiskifarinum.

<u>Dømi : Bólkur X.</u>
Brúktir fiskidagar í undirbólkinum fiskiárið 2015/2016 tilsamans: *1.200 fiskidagar*.
Fiskifar *AAAA* hevur í fiskiárinum 2015/2016 brúkt av tillutaðum fiskidøgum við støði í § 29, stk. 1 og brúkt fiskidagar avhendaðir frá øðrum sambært § 14, stk. 1: *120 fiskidagar*.
Fiskidagar ásettir bólki X sambært § 29, stk. 11: *200 fiskidagar*.
Fiskifar *AAAA* kann av hesum døgum brúka upp til: 200*(120/1.200) = 20 fiskidagar.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Fiskimálaráðið, dagfesting.

**Høgni Hoydal**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**